


# Statoil gevst í Alaska

**Jan Müller**

25.11.2015 - 18:42

Oljan.fo

Vegna harða altjóða kapping um íløgurnar hevur norska oljufelagið Statoil gjørt av at lata skrivstovu sína í Anchorage í Alaska aftur. Felagið metir nevniliga ikki, at loyvini tað hevur í Tsjuktsjerhavinum út fyri Alaska eru kappingarfør við onnur leitiøki í portefølјuni hjá Statoil aðrastaðni í heiminum.

"Vit hava arbeitt við at gera loyvini búgvin til boring síðani 2008. Hóast eitt stórt arbeiði er gjørt kunnu vit ikki loyva okkum at halda fram við at menna hesi økini við støðuni í oljuheiminum í løtuni," sigur Tim Dodson, leitistjóri hjá Statoil.

Talan er um 16 leitiloyvi, har Statoil er fyristøðufelag og onnur 50 loyvi, har Conoco Phillips er fyristøðufelag.

Statoil ger tó greitt, at felagið hevur fingið so nógva vitan og royndir í Alaska, at felagið fer at brúka hesi, tá og um felagið einaferð í framtíðini vendir aftur til hesi økini.

